# Ungir sjónleikarar hittast í Klaksvík

120 børn og ung og 40 vaksin verða við á barnasjónleikarstevnuni í Klaksvík. Talan verður um fimm sjónleikarabólkar úr útlondum og fimm úr Føroyum. Børnini fáa holla vegleiðing í leiki, og skipað verður fyri verkstovum. Eisini verða leikirnir eftirmettir og góða ráð verða givin eftir hvønn leik. Leikirnir verða framførdir ókeypis í Badmintonhøllinin, og verður meir at frætta um hesar seinni. Flestu luttakararnir koma til Klaksvíkar 29. juni, og mikudagin 1. juli verður ein størri skrúðgonga, har høvi verður at heilsa uppá teir mongu geastirnar. - Fyrireikarnir til norðurlendsku barnasjónleikarastevnu, sum eru MáF og Klaksvíkar Sjónleikarafelag, halda, at Klaksvík er sera væl egnað við hópin av møguleikum. Eisini eftir leik, tá ið gestirnir skulu hava høvi at hyggja seg um í býnum, í fjøllunum og á sjónum, siga fyrireikararnir í einum tíðindaskrivi.



# Nýggir nevndarlimir

Týsdagin 16. juni hevði Reiðarafelagið fyri Farmaskip aðalfund. Fyri vali á nevndarfundinum stóðu Torleivur Mikkelsen og Rói Kalsø. Hvørgin teirra stillaði uppaftur. Í teirra stað vórðu valdir Gunnbjørn Joensen og Rúni V. Poulsen. Umframt hesar sita í nevndini Annfinn V. Hansen, Kaj M. Petersen og Jens Meinhard Rasmussen.



*Tinganest verða nú aftur at síggja á palli*

# Tinganest á Asfalt

**Tá Asfalt fer av bakkastokki í Tórsgøtu 3. og 4. juli, verður legendariski vágabólkurin Tinganest ein av bólkunum, ið fara á pall**

ASFALT 2009
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tinganest eru sum gott vín. Teir blíva betri við árunum, og nú eini 25 ár eru síðani teirra útgávur komu út sum kasettubond á fyrsta sinni, hevur bólkurin aftur fingið pláss í fremstu røð. Fólk hava ikki gloymt teir, heldur ikki tey, ið kanska ikki tordu at viðganga seg sum fjepparar fyri 25 árum síðani.

Í dag standa fleiri av sangum teirra sum varðar. Og bólkurin er, meira enn nakar, ímyndin av serstaka "vága-soundinum", ið fleiri vágabólkar annars í ávísan mun hava, men Tinganest vóru fyrstir og mestir og bestir, tá tað umræður "vágasound".

## Bólkurin

Bólkurin var til fyrst í áttatiárðinum við navninum Tinganest. Tó hevði ymisk manning myndað bólkar í Sørvági líka frá sekstiárunum, har Magnus, Jóan Jakku og Eivind vóru partar. Seinni eisini í Danmark, har teir vóru í lestrarørindum

Í 1983 kom fyrsta bandútgávan, og var hetta band nógv spælt. Sangir sum Upp Á Tá og Vágagellan vóru - og eru - javnan at at hoyra. Í 1984 kom næsta bandútgávan og triðja kom í 1986. Bólkurin hevur verði við í øðrum útgávum eisini. Serliga Jóan Jakku hevur verið virkin á tónleikaøkinum við soloútgávum, og saman við øðrum.

Nytt tilfar verður eisini at hoyra í komandi framtíð frá onkrum av limunum.

Tinganest hava til Asfalt vant duliga eina skrá, ið hevur við teir kendu sangirnar hjá Tinganest, og bólkurin gleðir seg at fara á Asfalt-pallin.

Núverðandi manning í Tinganest er: Finnur J. Jacobsen, trummur, áslåttur og sang, Jóan Jakku Guttesen, bass og sang, Holgar Jacobsen, guitar, Magnus á Stongum, guitar og sang. Henda manning hevur myndað bólkin seinastu 2 árini.

# Terji Rasmussen og fólkadansarar

**Jóansøkufestivalurin avdúkar nú enn fleiri nøvn, ið fara a pall á jóansøku, og hesaferð er talan um føroyska troubadoururin Terja Rasmussen. Umframt fara danskir fólkadansarar at seta dám á, tá festivalurin byrjar**





*Terji Rasmussen fer saman við fólkadansarum at seta sín dám á Jóansøkufestivalin*

FESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*Dagfinn@sosialurin.fo*

Nú er enn eitt navn komið afturat á listanum yvir tey, ið fara á pall á Jóansøkufestivalinum, sum hesaferð er stuðulstiltak til frama fyri at gera saltsiloina á Drelnesi til mentanarhús.

Terji Rasmussen fer á pall á Jóansøkufestivalinum. Terji hevur síðani á heilt ungum árum gjørt vart við seg á føroyska tónleikapallinum. Fyrst við Funkies, ið gav tvær singleplátur út, síðani við ymsum bólkum, men kendur gjørdist hann av álvara av samstarvinum við Frændur og við frændan Eyðun Nolsøe.

Størsta varðan setti hann sær tó síðst í áttatiárunum, tá hann gav plátu út; Terji og Føstufressar. Fressarnir vóru í stóran mun manning úr úrmælingabólkinum Plúmm, og varð útgávan eini 10 ár seinni – um aldamótið – kosin aldarinnar útgáva.

Terji fer á Jóansøkufesivalinum at spæla úr rúgvuni av sangum, ið eru fólkaogn.

## Fólkadansur

Byrjanin á Jóansøkufestivalinum verður serstøk, tí tá fara danskir fólkadansarar at seta dám á. 12tur nevnist dansibólkurin, og hevur hann navn eftir tveimum fólkadansum, 12 pør eru í bólkinum og tey vilja fegin ferðast – på tur. Bólkurin er av Sælandi.

Til ber at vitja www. joansokufestivalurin.eu

# 3st á Asfalt

**Asfalt avdúkar nú, at bólkurin 3st verður partur av Asfaltskránni**



*Ungi bólkurin í Havn verður partur av skránni á Asfalt*

Asfalt verður í Tórsgøtu í Havn 3. og 4. juli og ein av mongu bólkunum, ið fara á pall, er 3st.

3st er mannaður við 5 limum; sang: Allan Korsager Davidsen, guitar: Henning Jensen, bass: Signar Kristiansen, trummur: Sigurd Justinussen, violin: Rebekka Blak.

Bólkin stovnaðu Allan og Sigurd í 2004. Men bólkurin hevur ikki verið so nógv frammi, og hevur ikki funnið fótafestið fyrr enn fyri einum ári síðani. Hóast útbúgvingar, limaskifti, o.a. hevur verið ein lítil forðing, so hevur bólkurin ongantíð verið so tight og til dystin fús, sum nú.

Tónleikurin hjá bólkinum nemur við ymsar sjangrur. Ein góð lýsing av tónleikinum hjá bólkinum er melodiskur poprockur við einum alternativum twisti.